# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um lívmóðurkrabba

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um lívmóðurkrabba

Um hesi sjúkueyðkenni eru tilstaðar skal ávísast til krabbameinsútgreining

- Vaginal bløðing byrjað > 1 ár eftir seinastu menstruatión (postmenopausal bløðing) ella óvanligar viðvarðandi bløðingar í perimenopausuni.

Skal kannast/spyrjast um

- Bløðingsanamnesu
- Undirlívskanning
- Palpatión av abdomen
  Spyrja um forsøgu við myom

Serligt fyrivarni eigur at vera til kvinnur, ið eru fongdar við arvaligari dispositión til tjúkktarmskrabba (HNPCC), yvirvekt, hypertensjón og til bróstkrabbasjúklingar í tamoxifen viðgerð.

## Handfaring av residiv

- Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Ávísing sendast til gynekologiskt ambulatorium
- Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Nýggj ávísing sendast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um lívmóðurkrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m. Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026